


Atlantic Airways selur 500 einvegis ferðaseðlar millum Ísland og Føroyar á netinum. Far inn á atlantic.fo og keyp ferðaseðilin sjálv/ur. Ferðin kann bert keypast á atlantic.fo

Atlantic Airways flýgur til Íslands hvønn mánadag og fríggjadag. Tilboðið er galdandi til 28. mars 2004.

ATLANTIC AIRWAYS

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

RIO · BRAVO RESTAURANT

frá 14. nov. og til jóla

Jól fyri kræsnar gómar

Forrættur
Innbakaðir vatnkrabbahalar við rómaosti,
borðreiddir á broyskna salat,
við kremaðari hummaraglasering

Steik
Pesto-grilleráð dunnubringa,
fylt við fríksum kryddurtum.
Borðreidd á sellerikompot
við smørgrillaðum eplum,
grønmeti undan árstíðini og súreplasauce.

Omaná
Hunangsmelón við sólbersorbet og fruktpuré

Vel millum 2 verðar 250,- ella 3 verðar 300,-
Borðbílegging á 319767

Bon Appetit!

team85



# Samfelagsmøti í Ebenezer og á Hálsi






SAMFELAGSMØTI

Samfelagsmøtini, sum byrjaðu í Ebenezere í Havn mikudagin, halda fram alt vikuskiftið. Í dag verður byrjað klokkan 16 við uppbyggingarmøti í høllini á Hálsi við evninum "Bøn og vilji Guds" og klokkan 20 verður evangeliskt møti. Klokkan 22.30 er opið hús. Sunnudagin klokkan 10 er breyðbróting, klokkan 12.15 er barnamøti og klokkan 16 er uppbyggingarmøti undir heitinum "Trúgv og Gudsótti". Nátturði verður so beint aftaná og klokkan 19 verður evangeliskt møti aftur. Myndirnar, sum eru frá bønarmøtinum í Ebenezer mikukvøldið, hevur Jens K Vang tikið. Vit síggja kórið í Ebenezer og salin við fólki.

# Liverpool og Manchester U

TÍÐINDASKRIV

Liverpool felagið í Føroyum skipar í samstarvi við Bryggjuna í Vestmanna fyri Ársins dysti: Liverpool vs Man. Utd.

Dysturin byrjar kl. 14:00, upphiting byrjar kl. 13:00

Liverpool Føroyar heitir á allar limir felagsins, allar Liverpoolarir umframt allar Man Utd og fótbóltsáhugað um at møta upp og seta sín dám á dagin.

Góð tilboð vera undir dystinum.



# Jólaølið er á gøtuni

**Tey bæði bryggjaríini í Føroyum hava nú sent síni serligu jólabryggj á gøtuna**

ØL
*Stefan í Skorini*

Hetta vikuskiftið hevur tann sonevndi J-dagurin verið á fleiri skeinkistøðum í landinum. Her hevur tað borið til at keypa eina øl fyri bert eina krónu.

Orsøkin til hetta aftur-vendandi átakið er, at um hesa tíðina senda bryggjaríini jólaølið á marknaðin.

Tey bæði føroysku bryggjaríini hava aftur í ár gjørt eina serstaka øl til jólini. Føroya Bjór hevur sína eyðkendu øl, sum nevnist Jólabryggj, meðan Restorffs hevur bryggjað eina heilt nýggja øl, sum nevnist Jólatrøllið.

Myndin á etikettuni er ein tekning hjá Williami Heinesen, sum nevnist Jólatrøllið. Myndin er teknað í 1939. Hjá Føroya Bjór eru tað vakrar jólaklokkur, ið prýða fløskuna.

Talan er í báðum førum um myrkt og sterkt øl, og alkoholinnihaldið er 5,8 prosent, sum vanligt er við jólabryggi.




*Tað eyðkenda jólaølið er nú komið á gøtuna*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



Ljósviðgerð

Kennir tú teg troyttan?
Hevur tú brúk fyri meira svøvni?
Er tað ringt at koma upp um morgunin?
Ert tú illa upplagdur?
Ert tú erkvisin?
Manglar tú orku?
Hevur tú eina søta tonn?

Kanska skuldi tú roynt lampuna til ljósviðgerð

Serliga um heystið og um veturin ynskja vit meira ljós. Mangul uppá ljós gevur ofta eina kenslu av dapurleika, manglandi orku og mótloysi og kann eisini geva eina nógv økta trongd til søtt. Hetta verður ofta nevnt tunglyndi. 5-6% líða av tunglyndi og nógv fleiri eru vetrartroytt.

Gransking vísir at LJÓSVIÐGERÐ kann hjálpa teim flestu (70-75%) av við vetratroyttheit/tunglyndi.

Ljósviðgerð 1/2 til 1 tíma dagliga (best um morgunin) er í teim flestu førum nokk. Ímeðan tú fært ljósviðgerð kanst tú t.d. eta morgunmat og/ella lesa eitt blað.

Sum oftast merkist innan 14 dagar um ljósviðgerðin hjálpir. Les meira um tær lampur vit hava at selja og um gransking av ljósviðgerð á okkara heimasíðu www.ergo.fo undir LJÓSVIÐGERÐ.

Ergo & Hjálpartól

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 •Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo

Sosialurin 341800

# Rembrandt, sæddur og stolin...



*Sambært donskum Zulu-hyggjarum er besti filmurin í ár "Rembrandt". Mikudagin sæst hann í Norðurlandahúsinum*

**Filmsfelag Norðurlandahúsins KLIPP sýnir mikudagin 12. november klokkan 20 annan filmin í røðini henda veturin. Hesin filmur er danskur og ber heitið "Rembrandt".**

SÝNING
*tíðindaskriv*

Bæði ummælarar og áskoðarar hava tikið serstakliga væl ímóti hesum filmi.

Filmurin fekk fyri stuttum sonevndu Zulu Award, sum sjónvarpsstøðin við sama navni hjá TV2 letur á hørjum ári. "Rembrandt" varð kosin ársins besti filmur, har eisini besti mannligi leikarin, Lars Brygman, varð funnin.

Tað er Jannik Johansen sum hevur gjørt eina bæði hugvekjandi og stuttliga søgu úr stórsta listarliga ráninum í Danmark, tá ein Rembrandtmálningur varð stolin. Filmurin lýsir fyrst og fremst faðir og son, sum eru við í hesum margháttliga ráninum.

Hetta er fyrsti filmurin hjá unga Janniki Johansen. Áður hevur hann gjørt vælumtóktu sjónvarpsrøðina "Edderkoppen". Í nýggja filminum "Rembrandt" síggjast fremstu donsku filmsleikarar beint nú og helst er tað orsøkin til, at hetta er best umtókti filmurin á móðirmálinum í donsku biohallunum, har ein fjórðingsmillión áskoðarar longu hava sæð hann.

Filmurin "Rembrandt" verður sýndur í Norðurlandahúsinum 12. november.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Leygardagin 08.11.kl. 18³⁰
Leygardagin 08.11.kl. 21¹⁵
Sunnudagin 09.11.kl. 20⁰⁰
Sunnudagin 09.11.kl. 22⁴⁵




Leygardagin 08.11.kl. 20⁴⁵
Leygardagin 08.11.kl. 24⁰⁰
Sunnudagin 09.11.kl. 20⁴⁵
Sunnudagin 09.11.kl. 23⁰⁰




Leygardagin 08.11.kl. 18⁰⁰
Sunnudagin 09.11.kl. 18⁰⁰




Leygardagin 08.11.kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 09.11.kl. 18³⁰

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.